Undirskrift formansins:_____

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting:	26.11.2020 kl. 17:30
Málnr.:	16/01208 Gerðabók
Nevndarlimir:	Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Gunvá við Keldu, Tummas J. Lervig, Kristian Eli Zachariasen, Beinta Klakstein, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen og Herfrí J. Sørensen,
Varalimir:	Kjartan á Gravarbø møtti fyri Óla M. Lassen, og Óluva Klettskarð møtti fyri Steinbjørn O. Jacobsen.
Ikki møtt:	
Onnur:	Tummas T. Eliasen, kommunustjóri
Protokollførari:	Jensa Anthoniussen, fulltrúi

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
120/20	20/01186-3	Býráðslimum berst frá at møta á býráðsfundi - Steinbjørn O. Jacobsen og Óli M. Lassen
121/20	20/00905-1	Regulering av almennu byggisamtyktini fyri Klaksvíkar kommunu sambært verandi viðurskiftum
122/20	20/01094-2	Búnaðarstovan um ummæli til sølu av matr.nr. 409 frá Innistovu- og Útistovufestinum
123/20	20/01151-2	Umsókn um marknaumskipan millum matr.nr. 241an og 254b
124/20	20/01153-2	Umsókn um marknaumskipan - matr.nr. 321 og 316a
125/20	20/01173-2	Umsókn um sundurbýti av matr.nr. 69 í Árnafirði
126/20	20/01048-2	Viðv. sundurbýti av matr.nr. 84 í Mikladali
127/20	20/01103-1	Eykajáttan og manglandi framflyting, Endurnýtslan – *fyrra viðgerð*
128/20	20/01178-1	Kommunala Smiðjan serligar umstøður í 2020 (Korona) – *fyrra viðgerð*
129/20	20/00587-4	Maskina (dumpari) til Svínoyar - *flyting millum kontur, seinna viðgerð*
130/20	20/01164-1	Fíggjarætlan 2021 rakstur, mentanarøkið
131/20	20/00840-66	Fíggjarætlan 2021, Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*

Til viðgerðar

120/20
20/01186-3 Býráðslimum berst frá at møta á býráðsfundi - Steinbjørn O. Jacobsen og Óli M. Lassen

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Klaksvíkar Býráð	26.11.2020	120/20

20/01186-3 Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi - Steinbjørn O. Jacobsen

Frágreiðing um málið:
Steinbjørn O. Jacobsen, býráðslimur, hevur boðað frá, at honum berst frá at møta á býráðsfundinum 26. november 2020. Næstvald á valevnislistanum er Óluva Klettskarð.
Og Óli M. Lassen, býráðslimur, hevur boðað frá, at honum berst frá at møta á býráðsfundinum 26. november 2020. Næstvaldur á valevnislistanum er Kjartan á Gravarbø.

Lógargrundarlag:
- Kommunustýrislógin, § 18, stk. 1:
  Berst kommunustýrislimi frá at møta á kommunustýrisfundi vegna heilsustøðu, kunnu teir limir, ið eru valdir á viðkomandi valevnislista, krevja, at tiltakslimur fær fundarboð. ... Er eingin kommunustýrislimur, sum kann seta fram krav um at geva tiltakslimi fundarboð, kann tiltakslimurin sjálvur krevja at fáa fundarboð.
- Kommunustýrislógin, § 18, stk. 2:
  Berst kommunustýrislimi væntandi frá at røkja starv sítt í meira enn 14 samfullar dagar vegna annað alment starv, heilsustøðu ella aðra lógliga orsøk, skal viðkomandi boða borgarstjóranum frá, og borgarstjórin skal síðani geva tiltakslimi fundarboð.
- Kommunustýrislógin, § 18, stk. 3:
  Kommunustýrið ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.

Fíggjarligar avleiðingar:
Samsýning til tiltakslimirnar.

Tilmæli:
Býráðið verður at taka støðu til, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimum eru loknar.

Klaksvíkar Býráð 26. november 2020:
Einmælt samtykt at lata Óluvu Klettskarð, Kjartan á Gravarbø og Eyðstein Ó. Poulsen taka sæti í býráðnum til fundin.

121/20
20/00905-1 Regulering av almennu byggisamtyktini fyri Klaksvíkar kommunu sambært verandi viðurskiftum

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	16.11.2020	137/20
2 Tekniska Nevnd	18.11.2020	84/20
3 Klaksvíkar Býráð	26.11.2020	121/20

20/00905-1 Regulering av almennu byggisamtyktini fyri Klaksvíkar kommunu sambært verandi viðurskiftum

Frágreiðing um málið:
Tekniska fyrisiting hevur gjørt eina gjøgnumgongd av almennu byggisamtyktini fyri Klaksvíkar kommunu og hevur varnast, at summi mørk í økisásetingunum áttu at verið regulerað til verandi viðurskiftir.
Hvør økispartur verður lýstur niðanfyri:

D14, undir Hálsi/Traðagøtu:
Tekniska fyrisiting hevur varnast, at grøni kílin/fríøkið D14 undir Hálsi/Traðagøtu ikki fevnir um ánna, ið er staðsett norðaliga á matr.nr. 241a (kommunal ogn).
Samanborið við nógvar aðrar áir í býnum, so er henda ber og ikki løgd í rør, sum flestu áir í býnum eru, og er hetta ein dygd fyri grøna økið. Aftrat tí er áin ein týðandi liður í at handfara yvirflatuvatnið, tá ið áarføri er. Harnæst liggur hon soleiðis fyri, at hon er tráð við aðrar leiðingar eitt nú Traðagøtu.
Tekniska fyrisiting leggur upp til at uml. 1000 m^2 av A5 og A14 verða lagdar aftrat D14.



Mynd 1. / D14

A1, Oyravegur (sunnanfyri kirkjugarðin) og Norðoyri og A2, á Fossum:
Tekniska fyrisiting hevur varnast, at í ásetingunum fyri bygningshædd stendur einans 8,5 m sum mest loyvda hædd, tá talan er um bygging omanfyri veg.
Vanligt er, at ásetingin ljóðar soleiðis: 8,5 m til mønu og 5,5 m til yvirgrind.
Henda áseting tryggjar, at framsíðurnar á bygningum ikki verða 8,5 m frá miðaljørðildi til tak og tískil kunnu geva ein tyngjandi dám á bústaðarøki.



1Mynd 2. / Bygningshædd

Lógargrundarlag:
Býarskipanarlógin

Fíggjarligar avleiðingar:
-

Tilmæli:
Mælt verður til:
- D14: at økismarkið millum D14, A5 og A14 verður dagført sambært mynd 1.
- A1: lagt verður aftrat ásetingini fyri bygningshædd: 8,5 til mønu og 5,5 til yvirgrind.
- A2: lagt verður aftrat ásetingini fyri bygningshædd: 8,5 til mønu og 5,5 til yvirgrind.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. november 2020:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 11-11-2020.

Tekniska Nevnd 18. november 2020:
Nevndin tekur undir við UBN 16-11-2020.

Klaksvíkar Býráð 26. november 2020:
Tilmælið frá TN 18-11-2020 einmælt samtykt.

122/20
20/01094-2 Búnaðarstovan um ummæli til sølu av matr.nr. 409 frá Innistovu- og Útistovufestinum

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	16.11.2020	129/20
2 Havna- og Vinnunevndin	16.11.2020	K-22/20
3 Klaksvíkar Býráð	26.11.2020	122/20

20/01094-2 Búnaðarstovan um ummæli til sølu av matr.nr. 409 frá Innistovu- og Útistovufestinum

Frágreiðing um málið:

Í skrivi frá Búnaðarstovuni søkja festararnir av Innistovu- og Útistovufestunum í Klaksvík um at keypa matr.nr. 409, sum er neyst við Klaksvíksveg.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg um landsjørð

Fíggjarligar avleiðingar:
Kommunan bert ummælandi partur

Tilmæli:
Í samband við at fokus er sett á fjørulendið framvið vestursíðuni, mælir Tekniska Fyrisiting til, at kommunan ger Búnaðarstovuna varuga við, at býráðið arbeiðir við Serstakari Byggisamtykt í aktuella økinum, og at Búnaðarstovan - við sølu av neystinum – tí kunnar keyparan um, at ognin framyvir sannlíkt ikki varðveitir beinleiðis atgongdina út á sjógv.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. november 2020:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 06-11-2020.

Havna- og Vinnunevndin 16. november 2020:
Málið verið til kunningar.

Klaksvíkar Býráð 26. november 2020:
Tilmælið frá UBN 16-11-2020 einmælt samtykt tó við teirri viðmerking, at dráttur ikki verður út á sjógv í framtíðini.

123/20
20/01151-2 Umsókn um marknaumskipan millum matr.nr. 241an og 254b

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	16.11.2020	130/20
2 Klaksvíkar Býráð	26.11.2020	123/20

20/01151-2 Umsókn um marknaumskipan millum matr.nr. 241an og 254b

Frágreiðing um málið:
Eigararnir av omanfyri nevndu matriklum søkja um marknaumskipan, sum víst við reyðum á myndini niðanfyri.



Lógargrundarlag:
Matrikullógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan bert tilmælandi partur

Tilmæli:
Byggiamtyktarliga er onki til hindurs fyri umskipanini, og mælir Tekniska Fyrisiting tí til at senda Umhvørvisstovuni málið við tilmæli um at játta.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. november 2020:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 06-11-2020.

Klaksvíkar Býráð 26. november 2020:
Tilmælið frá UBN 16-11-2020 einmælt samtykt.

124/20
20/01153-2 Umsókn um marknaumskipan - matr.nr. 321 og 316a

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	16.11.2020	131/20
2 Klaksvíkar Býráð	26.11.2020	124/20

20/01153-2 Umsókn um marknaumskipan - matr.nr. 321 og 316a

Frágreiðing um málið:
Eigararnir av omanfyrinevndu matriklum søkja um marknaumskipan, sum víst við reyðum á myndini niðanfyri.

Lógargrundarlag:
Matrikullógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan bert tilmælandi partur

Tilmæli:
Byggiamtyktarliga er onki til hindurs fyri umskipanini, og mælir Tekniska Fyrisiting tí til at senda Umhvørvisstovuni málið við tilmæla um at játta.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. november 2020:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 06-11-2020.

Klaksvíkar Býráð 26. november 2020:
Tilmælið frá UBN 16-11-2020 einmælt samtykt.

125/20
20/01173-2 Umsókn um sundurbýti av matr.nr. 69 í Árnafirði

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	16.11.2020	125/20
2 Klaksvíkar Býráð	26.11.2020	125/20
3 Árnafjarðarnevndin		

20/01173-2 Umsókn um sundurbýti av matr.nr. 69 í Árnafirði

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagf. 9. nov. 2020, har greitt verður frá, at eigararnir av matr.nr. 69 og 57 í Árnafirði søkja um sundurbýti og partvísa samanlegging av nevndu matriklum.

Talan er um umskipan innangarðs millum ognir innan ymiskar byggisamtyktarligar økispartar, samstundis sum 2 gl. uttangarðs verða fluttir frá matr.nr. 69 til 57.

Lógargrundarlag:
Matrikullógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Kommunan bert ummælandi partur

Tilmæli:
Umsóknin stríðir ikki móti ásetingunum í Almennu Byggisamtyktini fyri Klaksvíkar kommunu. – Tekniska Fyrisiting mælir tí til at viðmæla umskipanini.

GG: Málið er eisini sett á skrá hjá Árnafjarðarnevndini, sum hevur havt sín seinasta regluliga fund í ár. – Ein møguleiki er, at býráðið avgreiðir málið nú og kunnar Árnafjarðarnevndina á fyrsta fundi í 2021.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. november 2020:
Nevndin beinir málið í Árnafjarðarnevndina.

Klaksvíkar Býráð 26. november 2020:
Atli S. Justinussen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Tilmælið, dagf. 09-11-2020, einmælt samtykt, treytað av at Árnafjarðarnevndin eisini tekur undir við tí.

126/20
20/01048-2 Viðv. sundurbýti av matr.nr. 84 í Mikladali

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	16.11.2020	126/20
2 Mikladalsnevndin		
3 Klaksvíkar Býráð	26.11.2020	126/20

20/01048-2 Viðv. sundurbýti av matr.nr. 84 í Mikladali

Frágreiðing um málið:
Eigarin av matr.nr. 84 søkir um loyvi at býta part 2 frá matr.nr. 84 í Mikladali.

Matr.nr. 84 í Mikladali, sum er 274 m^2 til víddar, liggur í trimum pørtum við víddum, sum víst niðanfyri:
1: við ábygdum sethúsum 200 m^2
2: úthús 19 m^2
3: urtagarðsstykki 35 m^2

Byggisamtyktarliga liggur umrødda øki í økisparti A27, har minsta grundøkjavídd er sett til 300 m^2 fyri vanlig hús og 200 m^2 fyri samanbygd hús.



Lógargrundarlag:
Matrikullógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Kommunan bert ummælandi partur

Tilmæli:
Gjørt verður tó vart við, at matrikulmyndugleikin liggur hjá Umhvørvisstovuni, og um frávik skulu gerast frá byggisamtyktarligum ásetingum, verður býráðið at játta undantaksloyvi til hetta.

Við støði í ásetta minsta mark fyri grundøkjavídd, mælir Tekniska Fyrisiting frá at játta sundurbýti til ein sjálvstøðugan matrikul.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. november 2020:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 09-11-2020.

Klaksvíkar Býráð 26. november 2020:
Tilmælið frá UBN 16-11-2020 einmælt samtykt.

127/20
20/01103-1 Eykajáttan og manglandi framflyting, Endurnýtslan – *fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Tekniska Nevnd	18.11.2020	88/20
2 Fíggjarnevndin	24.11.2020	97/20
3 Klaksvíkar Býráð	26.11.2020	127/20
4 Klaksvíkar Býráð	17.12.2020	

20/01103-1 Eykajáttan og manglandi framflyting - Endurnýtslan

Frágreiðing um málið:
Í samband við at Klaksvíkar kommuna hevur gjørt eitt nýtt endurnýtslupláss á Grønhøvda, vóru 3,4 mió.kr játtaðar til verkætlanina í 2019.

Tað eydnaðist bert at brúka 2,0 mió. kr. til verkætlanina í 2019. Sostatt var neyðugt at flyta restjáttanina upp á 1,4 mió.kr. fram til 2020. Hetta er tíanverri ikki gjørt, og tí er ein meirnýtsla staðfest í 2020.

Neyðugt er, at viðkomandi nevndir og býráð staðfesta meirnýtsluna í 2020, ella at málið verður tikið upp til eina serstaka viðgerð.

Korona hevur eisini viðført eina eyka útreiðslu fyri Endurnýtsluna, tí ætlanin var tann, at Vegadeildin skuldi fremja part av verkætlanini. Málið hevði skund, og tí varð – í samráð við borgarstjóran - ein avtala gjørd við Kanjon um at taka sær av liðugtgerðini av Endurnýtsluni, tí Vegadeildin var ikki tøk grundað á koronu.

Eykaarbeiðið hjá Kanjon var:
- Flyting av Endurnýtsluni
- Uppsetan av hegni og portri
- Stoypan av fundamentum til skúr
- Planering av øki suður (møguliga skal IRF rinda ein part)

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Málið viðførir eina meirnýtslu upp á 1,4 mió.kr. (peningur, sum ikki bleiv fluttur fram) + eina eykaútreiðslu upp á 1,3 mió.kr. fyri arbeiðið hjá Kanjon.
Í samband við at vatnleiðingin hjá kommununi í Norðoyatunlinum er seld, so eru 400 tkr. komnar inn. Nevndi peningur kann nýtast í samband við eykajáttanina, soleiðis at tørvur verður bert fyri 900 tkr. av *tøkum peningi*.

Tilmæli:
Við hesum verður mælt til, at málið um óbrúkta peningin í 2019 - 1,4 mió. kr. - verður staðfest. Eisini verður mælt til, at viðkomandi nevndir og býráð samtykkja eina eykjáttan upp á 1,3 mió.kr.

Tekniska Nevnd 18. november 2020:
Nevndin staðfestir óbrúkta peningin og tekur undir við eykajáttan ella møguligari aðrari inntøku.

Fíggjarnevndin 24. november 2020:
Nevndin tekur undir við TN 18-11-2020.

Klaksvíkar Býráð 26. november 2020:
Tilmælið frá FíN 24-11-2020 einmælt samtykt.

128/20
20/01178-1 Kommunala Smiðjan serligar umstøður í 2020 (Korona) – *fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Tekniska Nevnd	18.11.2020	77/20
2 Fíggjarnevndin	24.11.2020	96/20
3 Klaksvíkar Býráð	26.11.2020	128/20
4 Klaksvíkar Býráð	17.12.2020	

20/01178-1 Kommunala Smiðjan serligar umstøður í 2020 (Korona)

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagf. 10. nov. 2020, ið greiðir nærri frá málinum.

Serligar umstøður í samband við koronu hava ført til, at kommunala smiðjan væntandi ikki fær væntaðu inntøkuna í 2020, tí tað íresta inntøkur fyri einar 5 vikur hjá 4 monnum, sum hava fingið løn í tíðarskeiðinum. Lønarútreiðslan er góðar 100 tkr., og mista inntøkan er einar 280 tkr.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Stórur møguleiki er fyri, at kommunala smiðjan fer at hava eitt yvirtrekk upp á 300 tkr., tá endaliga er gjørt upp í 2020.

Tilmæli:
Fundurin í november er næstseinasti fundur í árinum. Tí verður málið lagt fyri hetta nevndarumfarið, um so er, at TN og FíN samtykkja eina umbøn um eykajáttan, tí tá skal málið eisini hava tvær býráðsviðgerðir.

Tekniska Nevnd 18. november 2020:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 10-11-2020.

Fíggjarnevndin 24. november 2020:
Nevndin tekur undir við TN 18-11-2020.

Klaksvíkar Býráð 26. november 2020:
Tilmælið frá FíN 24-11-2020 einmælt samtykt.

129/20
20/00587-4 Maskina (dumpari) til Svínoyar - *flyting millum kontur, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Tekniska Nevnd	07.10.2020	K-45/20
2 Fíggjarnevndin	20.10.2020	83/20
3 Klaksvíkar Býráð	22.10.2020	102/20
4 Klaksvíkar Býráð	26.11.2020	129/20

20/00587-4 Maskina (dumpari) til Svínoyar

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 22. okt. 2020.

Lógargrundarlag:
Ongin viðmerking.

Fíggjarligar avleiðingar:
Eingin játtan er tøk innan avsetingina í 2020.

Tilmæli:
Vísandi til akuttu umstøðurnar mælir tekniska fyrisiting nevndum og býráði til eina serstaka viðgerð av málinum, vísandi til akkuttu støðuna í Svínoy.

Tekniska Nevnd 7. oktober 2020:
Nevndin varð kunnað um, at dumparin í Svínoy er í ólagi, og at umsitingin arbeiðir við at finna ein annan dumpara til keyps.

Fíggjarnevndin 20. oktober 2020:
Nevndin tekur undir við TN 07-10-2020 og mælir til, at keypið verður fíggjað av *Vegir Íløgur*.

Klaksvíkar Býráð 22. oktober 2020:
Tilmælið frá FíN 20-10-2020 einmælt samtykt. Peningurin verður við hesum fluttur frá *Vegir Íløgur* til *Maskinur Íløgur*.

Klaksvíkar Býráð 26. november 2020:
Tilmælið frá BýR 22-10-2020 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

130/20
20/01164-1 Fíggjarætlan 2021 rakstur - mentanarøkið

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Mentanarnevndin	17.11.2020	68/20
2 Fíggjarnevndin	24.11.2020	98/20
3 Klaksvíkar Býráð	26.11.2020	130/20

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

20/01164-1 Fíggjarætlan 2021 rakstur - mentanarøkið

Frágreiðing um málið:
Í skrivi frá umsitingini, dagf. 11. nov. 2020, sæst uppskot frá mentanarnevndarforkvinnuni og vinnu- og mentanarstjóranum til raðfesting av rakstrinum á mentanarøkinum 2021.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin

Fíggjarligar avleiðingar:

Tilmæli:
Mælt verður til, at nevndirnar taka undir við hesum omanfyri lýsta uppskoti til fíggjarætlan (rakstur) fyri 2021 galdandi fyri mentanarøkið.

Mentanarnevndin 17. november 2020:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 11-11-2020.

Fíggjarnevndin 24. november 2020:
Nevndin tekur undir við MeN 17-11-2020, men at 100 tkr. verða fluttar frá *Norðurljós* til *grunnin Mentanarhúsið*.

Klaksvíkar Býráð 26. november 2020:
Tilmælið frá FíN 24-11-2020 einmælt samtykt.

131/20
20/00840-66 Fíggjarætlan 2021 - Klaksvíkar Býráð

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Klaksvíkar Býráð	26.11.2020	131/20

20/00840-66 Fíggjarætlan 2021 - Klaksvíkar Býráð

Frágreiðing um málið:
Á temafundi hjá føstu býráðsnevndunum 7. okt. og 24. nov. 2020 varð fíggjarætlan hjá Klaksvíkar kommunu 2021 viðgjørd. Á fundinum 7. okt. 2020 var ætlanin fyri raksturin komandi ár løgd. Semja var um, at rakstrarútreiðslurnar eftir ætlan vera 219,7 mió.kr. Umframt 7 mió.kr. í fíggjarkostnaði býtt millum 3,6 mió.kr. í rentustuðli og 3,4 mió.kr. til rentur av lánum. Samlaðu rakstrarútreiðslurnar verða tí 226,7 mió.kr. tilsamans.

Klaksvíkar kommuna		
Rakstrarstøð		**F.ætlan**
1.000 kr.		**2021**
§1	Kommunal fyrisiting	23.373
§2	Almanna- og heilsumál	86.176
§3	Børn og ung	46.716
§4	Útbúgving og gransking	10.255
§5	Mentan og frítíð	13.730
§6	Teknisk mál	23.755
§7	Kommunalt virki	15.690
	Rakstrarútreiðslur	**219.695**
	Fíggjarútreiðslur	7.000
	Rakstrarútreiðslur tilsam	**226.695**
	Inntøkur tilsamans	**-305.000**
	Rakstrarúrslit	**-78.305**

Mettu samlaðu rakstrarútreiðslurnar á 226,7 mió.kr. svara til ein vøkstur á 5,6% og. Av hesum vøkstri er lønarvøksturin 2,7%.
Størsta avbjóðingin í rakstrinum er útreiðsluvøksturin í samband við økta barnatalið og eldraøkið. Fólkavøksturin hevur fört við sær munandi meirútreiðslur til barnansing.

Samlaðu inntøkurnar verða mettar til 305 mió.kr. samanborið við 297 mió.kr. í ár, svarandi til 2,7% vøkstur.
Talan er tí um eina varliga meting um gongdina í inntøkuvøkstrinum. Seinastu árini hevur vøksturin verið umleið 4,5%. Gongdin í heimsbúskapinum hevur eina ávísa óvissu við sær. Hóast kommunan ikki hevur verið nógv merkt av hesum, má takast hædd fyri, at vøksturin neyvan verður líka stórur, sum hann hevur verið seinastu árini.

Klaksvíkar kommuna	
Fíggjarætlan 2021	**mió.kr.**
Inntøkur	305,0
Rakstrarútreiðslur	219,7
Rakstraravlop	85,3
Rentustuðul	3,6
Rentur	3,4
Avdráttir	-
Íløgur	**78,3**

Samanumtikið vísir fíggjarkarmurin hjá Klaksvíkar kommunu eitt rakstraravlop á 85,3 mió.kr. og fíggjarkostnað á 7 mió.kr. Til íløgur og avdráttir eru tí, uttan lántøku, 78,3 mió.kr.

Íløgustuðul	
Húsarhaldsskúlin	5,0
Mentanarpallur	6,0
Nólsoyar Pálshúsið	0,2
Íløgustuðul tilsamans	**11,2**
Íløgur	
Spillivatn/hitaskipan	2,0
Vegir, íløga	5,0
Byggibúning miðbýur	8,0
Rennibreyt	21,0
Havna- og vinnuøkið	5,0
Nýggjur barnagarður	7,0
Fimleikarhøll	2,0
Spæliland	6,0
Kappróðrarneyst	4,0
Spælipláss	2,0
Eldraøkið	2,0
Liðugtgerð vælveruøkið	1,0
Ítróttarøkið sitipláss	2,0
Íløgur tilsamans	**67,0**
Íløgustuðul og íløgur tilsamans	**78,2**
Samlað úrslit	**0,1**

Á frammanfyri standandi talvu eru raðfestar 78,2 mió.kr. í íløgustuðli og íløgum, 11,2 í íløgustuðli og 67 mió.kr. í øðrum íløgum.

Semja er eisini um, at skattaprosentið verður óbroytt 20,75%, og barnafrádrátturin 5.500 kr.

<u>Lógargrundarlag:</u>
Kommunala lóggávan

<u>Fíggjarligar avleiðingar:</u>

<u>Tilmæli:</u>
Verður lagt fyri býráðið til støðutakan.

Klaksvíkar Býráð 26. november 2020:
Atkvøtt varð um tilmælið, dagf. 24. nov. 2020; tað var einmælt samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Sostatt er **fíggjarætlan Klaksvíkar Býráðs fyri 2021** samtykt við hesum tølum:

	Fíggjarætlan 2021 (mió. kr.)
Inntøka	305,0
Rakstur í alt	219,7
Rakstraravlop	85,3
Rentustuðul	3,6
Rentur	3,4
Avdráttir	0,0
Eftir til íløgur	78,3
Íløgustuðul	
Húsarhaldsskúlin	5
Mentanarpallur	6
Nólsoyar Pálshúsið	0,2
	11,2
Íløgur	
Spillivatn/hitaskipan	2
Vegir, íløga	5
Byggibúgving, miðbýur	8
Rennibreyt	21
Havna- og vinnuøkið	5
Nýggjur barnagarður	7
Fimleikarhøll	2
Spæliland	6
Kappróðrarneyst	4
Spælipláss	2
Eldraøkið	2
Liðugtgerð vælveruøkið	1
Ítróttarøkið sitipláss	2
	78,2
Samlað úrslit	**0,1**

Harumframt var einmælt samtykt at taka undir við einum **skattaprosenti** upp á **20,75 %** og einum **barnafrádrátti** upp á **5.500 kr.**